MÁLTEIGURIN

Cola-nesið

– Vandi er fyri dálking á Kolanesinum, visti útvarpið at siga seinasta týsdag.

Nú so, hugsaði eg. Dálking er allastaðni. Men hvar og hvat er *Kolanesið?* Vit vita, hvat ein kolamoli er, ella kolasøla ella kolasvartur, og onkur hevur hoyrt um kolandi storm. Men hvat er eitt kolanes? Eitt nes fult av koli? So má tað vera onkustaðni í Suðuroy. Ella kanska er tað okkurt stað á Kolahálvoynni? Men har eru so nógv túsund nes og høvdar og forberg og tangar og hvørt av sínum.

Men so fall fimmoyrað. Síðan brennivínsgoymslan undir Trappuni bleiv stongd, verður bara coca-cola drukkið í Tinganesi, og tí eitur tað nú, at colamenn sita og drekka cola undir colatrappuni í Colanesinum.

CC

Tað almindiliga og tað vanliga

Vanligt er, at tað er skriftmálið, ið er tað ríka, tað umfatandi, tað greiða og beinrakna, serliga kanska á økjum, sum liggja eitt sindur burtur frá tí gerandisliga.

Undantøk eru tó meira enn so. Og nettupp føroyskt skriftmál er dømi um mál, har avmarkingar vitandi og við vilja verða settar, sum gera málið fátækari og ógreiðari enn talumálið.

Í føroyskum plagdu vit til dømis at skilja millum ein minni landtanga ella odda, sum vit kalla ***nes,*** og ein større part av einum landi, sum stingur út frá einum meginlandi, sum vit kalla ***hálvoyggj.***

Men hesin munur finst bara í gerandismálinum nú. Í skriftmálinum, í tíðindamálinum í útvarpinum o.tíl. er hann ikki til longur. Har verður tosað um Kolanesið og tað Arabiska nesið, hóast tað enn í oyrunum á nógvum føroyingum man ljóða líka marghátligt sum at kalla Mjóvanes eina hálvoyggj. Hetta er hvørt sítt.

Tá hetta orðið verður koyrt úr skriftmálinum og tíðindamálinum, eru tey gjørd fátækari á einum øki, sum annars plagar at hoyra skriftmálinum til, og tíðindamálið hevur aftur mist eina nyansu.

Hóast liðini í orðinum hvør sær eru føroysk, er ***hálvoyggj*** gjørt eftir donskum ***halvø,*** sum aftur er umsett úr týskum ***Halbinsel,*** ið er gjørt eftir tí latínska ***peninsula*** *'næstan oyggj'*, eitt orð, ið finst aftur í nógvum málum, sum t.d. eingilskt *peninsula,* franskt *peninsule* o.s.fr.

Hetta man eisini vera grundin til, at orðið er blivið forfjónað og rikið úr tíðindamálinum.

Áttu útvarpið og onnur ikki at rehabiliterað orðið, so tíðindamálið bleiv líka ríkt sum talumáli?

Sama neyðin sæst eisini á øðrum økjum, har vit hava tvey orð, annað í skriftmálinum, hitt í talumálinum, ella annað í skriftmálinum og talumálinum, hitt bara í talumálinum.

Í føroyskum skriftmáli hava vit ***vanligur,*** í føroyskum talumáli bæði ***vanligur*** og ***almindiligur.*** Í týdningi er rættiliga gott samanfall millum *almindiligur* og *vanligur.* Men *almindiligur* hevur eina merking afturat, sum *vanligur* ikki hevur. Um onkran, sum kanska er ógviliga lærdur, ógviliga ríkur el. tíl., men sum kortini er púra óuppgjørdur, kunnu vit siga, at hann er *»so almindiligur«.* Tað ber ikki til at siga, at hann er *»so vanligur«.* Talumálið er ríkari, meira nyanserað enn skriftmálið.

Fyri ikki at tala um tey førini, har skriftmálið slett ikki hevur nakað orð.

Eitt nú verður talumálsorðið *charmerandi* í skriftmáli umsett til *hugtakandi.* Men *hugtakandi* umfatar ógvuliga lítið av týdningsumráðnum hjá *charmerandi.*


Ein *»charmerandi kúllur«* er ikki heilt tað sama sum ein *»hugtakandi búrkroppur«.*

Hví brúkar skriftmálið ikki tað livandi málið sum orkukeldu?

Tað sær út, sum føroyskt skriftmál situr sum ein snipsk gomul genta við sínum ellis vommum og samansnerktu varrum. Eingin má nerta við hana, hon má forsvarast móti tí ónæriligu og óargaligu føroyska gerandismálinum.

Men beint undir vindeyganum hjá henni kemur okkara deiliga livandi gerandismál sjorandi sum ein láturmild, rund og kjálkareyð bygdargenta, ið ongan ræðist og sum ikki stingur upp fyri nøkrum.

JMH



©ERS, 1996

KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: KULDAKRÁKURNAR

K	V	I	N	N	U	H	O	N	D	B	Ó	L	T	U	R	
V	I	Ð	O	Y			L	A		Ø	L	A	N	D		
Ø	B	R	U	M		E	J	D	E	R		N		I	T	
L	S	+	A	G		D	R	U	I	D	A		D	Ú	N	I
D	K		Á	S	A		B	R	D		I	S	T	É	D	
L	I	T	T	I	R		O			K	A	S	T		N	
O	F	F		B	T		R		T	A	L	J	A		I	
T	T		V	I		P	I	O		S	T	Ú	K	A	N	
A	N	J	I	R		A	P		Á	T	A	K	A		G	
S	S		P	I	Z	Z	A	R	I	A		R		T		
A	T	A		A	A		L		R	R		A	K	A	S	
T	J	A	K		I	L	L	A			S	H	E	L	L	
	Ð	L	A		R	A	U	T	A	S		Ú	R		A	
N	R		G	L	E	I	R	U	R		Á	S	U		Ð	
É	I	N	G	I					M	A	R	I	M	S	A	
I	N	N	A	N	+	G	L	J	V	U	R		Ð		H	R

©ERS, 96

Hvønn leygardag verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ____«** á bjálvan.

Vinnari: Kathrina Olsen,
Undir Hálsi 7
700 Klaksvík

59

Loysunarorð:

Navn

Bústaður

Bygd/býur

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar
– bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR